# fýra stovur





## Politikkur

**Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri**

Bárður Nielsen er 32 ár, og ein av okkara kendastu politikarum. Hann býr í nýbygdum húsum saman við konuni Rakul Nielsen og fýra børnum – tríggjar gentur og ein drongur. Húsini hava 2,5 ár á baki, og tað er verfaðir Bárð, sum hevur teknað húsini. Hann arbeiðir sum granskoðari, men hevur sum ítriv at tekna hús. Húsini eru 230 fermetrar til víddar. Stovumøblarnir hava nøkur ár á baki, men ein partur er nýggjur. Møblarnir hjá teimum eru klassiskir og tíðarleysir, halda tey.

Tey hava ummøblerað stovuna fyri stuttari tíð síðani og eru nøgd við úrslitið. Bárður og konan vildu gjarna inrætta húsini beinanvegin tey fluttu inn í tey og ikki gera sum nógv onnur, sum bíða til børnini skulu konfirmerast.





## Ítróttur

**Halgir Dahl Olesen, hondbóltspælari, H71**

Halgir Dahl Olesen er kendur hondbóltspælari í H71. Dagliga starvast hann á Skipafelagnum. Hann býr í húsum saman við damuni Mariu og seks ára gamla soninum Brandi. Tey keyptu húsini fyri tveimum árum síðani, men húsini eru bygd í 2000. Tey eru 140 fermetrar til víddar.

Stovumøblarnir eru næstan allir nýggir, men okkurt arvagóðs er eisini við. Tey hava valt ikki at hanga so nógv upp á veggin, men at bíða til tey hava okkurt ordiligt at hanga upp.

Halgir er ikki so áhugaður í at innrætta, tí er tað mest konan, sum pyntar og møblerar.

– Mær dámar ikki, tá tað er ov nógv roks, sigur hann.